## Ein øld við kvinnum

Í dag eru hundrað ár, síðani tær fyrstu kvinnurnar vórðu valdar í býráðið í Reykjavík. Í 1908 skipaðu kvinnur í Reykjavík ein serligan kvinnulista, sum var tann fyrsti av sínum slagi í landinum. úrslitið varð, at kvinnulistin vann stóran sigur og fekk heili fýra umboð í býráðið. Í sambandi við 100 ára dagin verður skipað fyri serligari framsýning um kvinnur í býáðsarbeiði frá 1908 til 2008. Ætlanin er eisini at skriva bók um kvinnurnar í býráðnum.



## Flogfar settist aftur

Tá rutuflogfarið hjá Iceland Espress skuldi fara á flog úr Kastrup fyrrakvøldið, varnaðist flogskiparin, at eitt av tólunum virkaði ikki, sum tað skuldi. Flogfarið var á veg við 75 míla ferð eftir breytini, tá flogskiparin varnaðist brekið, men hann gjørdi av at taka ferðina av flogfarinum og at steðga. Ein talsmaður hjá Iceland Express sigur, at flogfarið skuldi upp á 120 míla ferð, áðrenn tað kundi lætta sær á, so her var eingin vandi á ferð.

*Rutuflogfarið hjá Iceland Express settist aftur í Kastrup (Mynd: Vísir)*

# Norðborg virkar svartkjaft til matna



*Gongst, sum eigararnir ætla, verður Norðborg ikki so ofta at siggja fullfermd við ídnaðarfiski í Fuglafirði hereftir, nú teir eisini eru farnir undir at virka svartkjaft til matna*

*Mynd: Norðborg*

**Tað er umráðandi at fáa sum mest burtur úr tilfeinginum, sum svimur í havinum. Kombineraða nóta-og trolskipið Norðborg í Klaksvík hevur leingi virkað sild til matna, og nú eru teir eisini farnir at virka svartkjaft til matna**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í løtuni liggur Norðborg í Klaksvík. Teir hava verið á leiðunum suður úr Føroyum, har væl av svartkjafti hevur staðið í seinastuni. Nøkur skip, sum landa til ídnað, hava fingið uppí í føroyskum sjógvi, og í vikuni landaðu bæði Fagraberg og Charlton fullfermdir í Fuglafirði.

- Vit eru komnir inn fyri veður og fara væntandi útaftur um middagsleitið í morgin.

Tað sigur skiparin hendan túrin, Kristian Martin Rasmussen.

### Spennandi roynd

Tað, sum er serligt við royndini hjá Norðborg í mun til royndini hjá hinum føroysku svartkjaftaskipunum, er, at Norðborg nú er farin at virka svartkjaft til matna umborð.

- Vit vóru ein túr í føroyskum sjógvi fyri jól, har vit skóru og frystu umborð, og nú eru vit so smátt farnir í gongd aftur.

Kristian Martin Rasmussen sigur, at marknaður er í Ruslandi fyri heilfrystum og skráskornum svartkjafti, og tað er hesin marknaður, teir í fyrsta lagi fara at dúva uppá.

- Vit vænta at fáa umleið 3 krónur fyri kilo fyri heilfrystan og umleið 5 krónur fyri kilo fyri skráskornan svartkjaft.

Skiparin vísir á, at teir higartil hava heilfryst meira, enn teir hava skráskorið, og heilfrysti fiskurin fer í blokk, har hvør blokkur vigar 20 kilo.

Spurdur, um prísmunurin millum heilfryst og skráskorið upp á 2 krónur ikki er heldur lítil, heldur Kristian Martin, at tað er hann ivaleyst, men málið er at fáa lyft prísin uppeftir.

### Meira burturúr

- Orsøkin til, at vit eru farnir undir at virka svartkjaft til matna, er, at prísurin á vøruni er betri nú, enn hann hevur verið.

Skiparin heldur tað eisini vera skilagott, at okkara fiskivinna roynir at fáa sum mest burtur úr tilfeinginum, sum sjálvandi ikki er óavmarkað.

Á hesum túrinum hjá Norðborg í føroyskum sjógvi, sum gjørdist heilt stuttur, høvdu teir trupulleikar við ljósmotorunum, og tá ið hann eisini boðaði frá so keðiligum veðri, gjørdu teir av at fara til lands.

Tá ið teir eisini høvdu okkurt at gera við skipið, kundu teir tað sama leggja leiðina til lands, sum at liggja úti og bíða eftir betri líkindum.

- Eg vænti, vit loysa aftur um middagsleitið í morgin, sigur Kristian Martin Rasmussen, skipari, sum ikki fer við Norðborg hendan túrin.

Nú svartkjafturin verður virkaður til matna, fellir altíð nakað í tangarnar, sum skipið eisini hevur umborð. Hetta er tað, sum fellir frá við skráskeringini og fiskur, sum verður skildur burtur úr.



*Norðborg virkar nú svartkjaft til matna, og um ein lítlan mánaða ella so fer skipið fyri fyrstu ferð í íslendskan sjógv at veiða lodnu til matna*

# Frysta lodnu til matna

**- Vit fara fyri fyrstu ferð at frysta lodnu til matna, tá ið vit fara í íslendskan sjógv um hálvan februar, sigur Bogi Rasmussen, skipari á Norðborg**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Royndirnar hjá Norðborg at virka og frysta svartkjaft til matna eru ikki tær einastu, sum liggja í kortunum hjá teimum, sum eiga skipið.

Bogi Rasmussen, skipari, sum er sonur Kristian Martin Rasmussen, sigur, at tá ið teir fara í íslendskan sjógv at royna eftir lodnu væntandi um hálvan februar, fara teir eisini – og fyri fyrstu ferð – at heilfrysta lodnu til matna.

- Íslendingar hava ikki viljað latið føroysk verksmiðjuskip virka lodnu umborð, sum er veidd í íslendskum sjógvi, men nú hava teir slept hesum.

### Serligur marknaður

Skiparin sigur, at heilfryst lodna hevur ein serligan marknað í Japan, og íslendingar hava í nógv ár sent lodnu hagar.

Hann heldur, at íslendingar hava stúrt fyri, at føroyingar eisini fóru at senda fisk á henda marknaðin, um loyvi varð givið til at frysta lodnu umborð á føroyskum skipum.

Japanski marknaðurin er í hesum føri avmarkaður til vertíðina, tá ið hon-fiskurin ber rogn.

Bogi vísir á, at fiskurin, sum japanesarar vilja hava, bert kann fiskast í einar tvær vikur ella so, meðan rognini eru best.

- Hetta er ein góður, men eisini heilt serligur marknaður í bestu vertíð, og treytin hjá japanesarum er, at fiskurin er júst, sum teir vilja hava hann at vera.

### Kann miseydnast

Skiparin sigur, at hesin marknaður miseydnaðist í fjør, tá ið ov nógv æti var í fiskinum.

- Men er fiskurin hin rætti, gjalda japanesarar eisini væl fyri vøruna.

Bogi Rasmussen sigur, at hann-fiskurin, sum ikki fer til Japans, í staðin fer í tangar og verður landaður til ídnað.

- Tað er tí ikki soleiðis, at fiskur, sum fellir frá, fer til spillis, leggur hann aftrat.